UTTAN ÚR HEIMI

# USA hevði samband við kvettroyndina í Venesuela



*Hugo Chavez, forseti í Venesuela. Sambært New York Times var amerikanska stjórnarumsitingin vitandi um, at hervaldið fór at koyra hann frá og tók undir við kvettinum*

*Mynd: Reuters*

**Týðandi umboðsmenn fyri Bush-umsitingina hittu fleiri ferðir kvettmenninar í Venesuela, áðrenn Hugo Chavez, forseti varð koyrdur frá. Semja var um, at forsetin máti koyrast frá**

VENESUELA
*Árni Joensen*

Stóra amerikanska blaðið New York Times, avdúkar nú, at amerikanska stjórnin var uppi í royndini at koyra forsetan í Venesuela, Hugo Chavez, frá.

Blaðið skrivar, at umboð fyri kvettmenninar vóru í Washington og greiddu frá, at teir vóru misnøgdir við forsetan. Sambært blaðnum tók stjórnarumsitingin undir við misnøgdini, men ráddi umboðunum til at nýta lóglig amboð, ætlaðu teir at koyra Chavez úr forsetaembætinum.

Men keldur í verjumálaráðnum Pentagon hava eina lýsing av málinum.

- Vit mæltu teimum ikki frá at gera statskvett. Vit sendu tekin til Venesuela um, at okkum dámdi ikki Chavez, sigur talsmaðurin hjá Pentagon sambært New York Times. Hann avsannar kortini, at verjumálaráðið var til reiðar at hjálpa kvettmonnunum við vápnum.

Beint eftir at kvettmenninir høvdu kunngjørt, at teir høvdu koyrt Hugo Chavez frá, kunngjørdi talsmaðurin hjá Bush forseta, Ari Fleicher, at amerikanska stjórnin var fegin um, at Chavez var frákoyrdur. Hann segði, at forsetin hevði roynt at binda fólksins vilja niður, og at tað var orsøkin til, at hann nú var koyrdur frá.

Aðrar keldur hava samstundis víst á, at amerikanska stjórnin var ógvuliga skjót at boða frá, at hon styðjaði Pedro Carmona, sum varð tilnevndur forseti eftir Chavez. Ein talsmaður hjá demokratiska flokkinum sigur við New York Times, at Hvítu Húsini kunnaðu Kongressina um kvettið í Venesuela, longu áðrenn tað var greitt, hvat veruliga var hent.

Sambært New York Times var tað týðiligt, at tað kom amerikansku stjórnini illa við, at Hugo Chavez varð settur aftur í forsetaembætið sunnudagin.

# Vandi fyri vatnflóð í Himmalaya

**Umhvørvisstovnurin hjá ST ávarar um, at tann veksandi hitin á Jørðini kann elva til stóra vatnflóð í Himmalaya**

UMHVØRVI
*Árni Joensen*

ST-stovnurin UNFP sigur í einari nýggjari frágreiðing, at fleiri vøtn í Himmalaya veksa so skjótt, at um nøkur fá ár verður vatnflóð í fleiri økjum. Úrslitið verður, at vatnið fer at floyma oman ígjøgnum dalarnar, og tað verður ein vanlukka fyri tey, sum búgva har, sigur stovnurin.

Leiðarin í einari kanningarnevnd, sum hevur kannað viðurskiftini, sigur, at fleiri vøtn eru vaksin nógv seinnu árini. Sum dømi verður nevnt eitt lítið vatn í Dolakha-økinum. Í fimti-árunum var hetta vatnið 0,23 ferkilometur til víddar, men í dag er tað 1,4 ferkilometur stórt.

ST hevur sent verkfrøðingar og onnur til Himmalaya at kanna, hvat gerast kann fyri at fyribyrgja vatnflóð og at kunna fólkið í dølunum um vandan.

- Vit plagdu at siga, at fjøllini vóru stór og sterk, og at einki kundi ávirka tey, men nú síggja vit, at tey eru líka viðkvom sum havið og skógirnir, sigur Klaus Topfer, sum er stjóri í umhvørvisstovninum hjá ST.

Búskapur og vinna:

## Rotin norskur toskur

Seinastu vikurnar hava donsku tollmyndugleikarnir steðgað fleiri lastbilum, sum eru komnir úr Noregi við toski, sum var ætlaður ES-marknaðinum. Men fiskurin vísti seg at vera so vánaligur, at donsku tollararnir sendu lastbilarnar aftur til Noregs við fiskinum.

Norska blaðið Aftenposten skrivaði í gjár, at millum 20 og 30 lastbilar eru vorðnir steðgaðir í Danmark, tí fiskurin var rotin. Bara teir seinastu fjúrtan dagarnar er fiskur fyri einar tíggju milliónir krónur sendur aftur til Noregs.

Sambært Aftenposten hevur hetta havt við sær, at fleiri fiskakeyparar í ES-londunum hava sýtt fyri at keypa tosk úr Noregi, og í fiski- og havbúnaðarfelagnum bera tey ótta fyri umdøminum hjá norskum fiski.

## Vend í USA

Nú er tað ikki longur ein spurningur, um vend er komin í amerikanska búskapin. Tølini fyri mars mánað vísa m. a., at ídnaðarframleiðslan í USA vaks 0,7 prosent samanborið við februar, og hetta er størsta framgongdin í næstan tvey ár. Eygleiðarar siga, at framgongdin partvíst stendst av stálstríðnum við ES, men at hon kortini er ein greið ábending um, at vend er komin í amerikanska búskapin.

## Verkfall

Seinastu dagarnar hava starvsfólk á nógvum norskum gistingarhúsum verið í verkfalli, og leygardagin fara fleiri afturat í verkfall. Norska gistingarhúsfelagið sigur, at frá leygardegnum fara 2000 av starvsfólkunum at sita við hús, og kanningar vísa, at hetta fer at kosta gistingarhúsunum einar 70 milliónir krónur um vikuna.

Sum ikki eina ferð er tað stríð um løn, sum skilir starvsfólkini og tey, sum eiga gistingarhúsini. Gistingarhúsfelagið hevur boðað frá, at fara onnur fakfeløg at leggja seg út í stríðið, fer felagið at stevna við kravi um endurgjald.

Úr Norðurlondum:

## Sjómansskúlar í kreppu

Donsku sjómansskúlarnir eru komnir í kreppu, tí tað eru alt ov fáir næmingar og alt ov nógvir skúlar. Úrslitið er, at frálæran versnar, og at fleiri og fleiri fara at velja sær aðrar útbúgvingar.

Stjórin á størsta sjómansskúlanum í Danmark, SIMAC í Svendborg, sigur, at gongdin hevur stóra ávirkan á gerandisdagin á skúlunum. Kurt Rye Damkjær sigur, at leiðslurnar á skúlunum hava nóg mikið við at hugsa um, hvussu tær skulu útvega sær nóg mikið av næmingum, so myndugleikarnir ikki læsa skúlarnar.

Hann vísir samstundis á, at skúlarnir eru illa fyri fíggjarliga, og at teir tí ferð eftir ferð noyðast at útseta ella avlýsa skeið, tí tey eru ov kostnaðarmikil.

- Trupulleikin er, at vit eru alt ov nógv um at býta teir fáu pengarnar, sum eru, sigur Kurt Rye Damkjær. Í fjør hevði skúlin í Svendborg ein umsetning upp á 55 milliónir krónur, og úrslitið var 3,5 milliónir krónur í halli. Stjórin ivast ikki í, at roknskapurin eisini fer at geva hall í ár.

Í løtuni ganga 38 næmingar á skúlanum í Svendborg, men har er pláss fyri 100 næmingum. Nýggir flokkar skulu takast upp í summar, og higartil hava 40 søkt um at sleppa í skúla. Fyrr plagdu umleið 80 at søkja um upptøku.

Stjórin á SIMAC er ikki í iva um, at tað eru alt ov nógvir sjómansskúlar í Danmark, og hann heldur, at tað hevði verið nóg mikið við tveimum skúlum. Tað almenna letur skúlunum 150 milliónir krónur um árið, men tað munar ov lítið til allar skúlarnar. Politikararnir hava higartil verið samdir um at varðveita teir skúlarnar, sum eru, men teir hava hinvegin eisini verið samdir um ikki at játta skúlunum meiri pengar.

Tað er heldur ikki bara sjómansskúlin í Svendborg, sum hevur fíggjarligar trupulleikar. Skúlarnir í Frederikshavn og Esbjerg-Fanø kæra seg um tað sama, og í báðum støðum kæra leiðslurnar seg eisini um, at færri og færri søkja inn á skúlarnar.

Bilar
Nr. 73 • hósdagur • 18. apríl 2002 • 76. árg.



*Bilurin er sera arbeiðsvinarligur, og innan eru allir hentleikar til bilføraran*

# Citroën Jumper – í heilt nýggjari útgávu

**Citroën Jumper er komin í nýggjari útgávu. ABS bremsuskipan eru nú standard í øllum útgávunum, eins og bilurin er betri ljóðisoleraður og fæst við hópin av eykaútgerð. Útgávurnar við 2.2 og 2.8 HDI motorum hava skivubremsur aftan og framman**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Eins og áður verður Citroën Jumper bygdur yvir sama karossarí sum líknandi útgávur av Peugeot og Fiat. Nýggi Jumper er ein heilt nýggjur bilur sum verður gjørdur í nógvum ymiskum útgávum sum vørubilur, lastbilur ella minibussur. Totalvektin er millum 2,9 og 3,5 tons og bilurin verður gjørdur í trimum ymiskum aksulfrástøðum. Vøruvognarnir fáast í ymiskum útgávum við vørurúmi í stødd millum 7,5 og 14 rúmmetrar.




*Her er Marni Nattestad, sølumaður hjá Ivan Johansen Bilum, við einum nýggjum Citroën Jumper til P/F Leif Mohr*

### Alt nýtt innan

Umframt at ABS bremsuskipan nú er standard í øllum útgávunum, eru nógvar aðrar ábøtur, sum til dømis betri ljóðisolering, betri ljós í forlyktunum, nýggjur gearkassi við hydrauliskari kobling. Innan er alt nýtt, instrumentborðið og setrini. Setrið hjá bilførarnum hevur el-hita og kann stillast allar vegir. Gearstongin, ið situr í instrumentpanelin, er sera løtt at handfara. Eisini hevur bilurin fjarstýrt sentrallás og el-síðurútar.

### Meira ljóðleysur

Jumper fæst við HDi motorum í trimum ymiskum støddum. 2.0 HDi við 85 hk, 2.2 HDi við 100 hk og 2.8 HDi við 127 hk. Eitt nýtt slag av motorupphangum er við til at gera bilin meira ljóðleysan og harvið merkjast ongar ristingar frá motorinum. Eisini er nógv gjørt fyri at tryggja tey ferðandi í bilinum, sum hevur airbag í vinstru síðu sum standard og kann leverast við airbag í høgru síðu sum eykaútgerð. Jumper við 2.8 HDi motorinum fæst eisini við automatiskum gearum. Sum minibussur er Jumper væl egnaður sum avlamisbilur.



*Sum vørubilur fæst Jumper í 3 ymiskum støddum við vørurúmum frá 7,5 til 14 rúmmetrar*

## Citroën Jumper 2.8 Hdi v/ last

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4 syl. 2.8 HDi common rail diesel 127 hk |
| Oljunýtsla | 10,5 km/l |
| Toppferð | 152 km/t |
| Dekkstødd | 195/70-15 PR-8 (Jumper 29) |
| Oljutangin | 80 litrar |
| Prísur | kr. 230.000,- v.MVG |
| Søluumboð | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 313666<br>www.ivan.fo |